**Leiðbeining til lærarar**

# Føroyskt

**C-stig**

**1. august 2023**

Krøvini til lærugreinina føroyskt eru ásett í námsætlanini í føroyskum 1-A og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – føroyskt 1-A
- Støðisnámsætlan
- Leiðbeining – skrivlig próvtøka – føroyskt C-stig
- Metingarark – skrivlig próvtøka – føroyskt C-stig
- Leistur – próvtøkuspurningur – føroyskt C-stig
- Leiðbeining – próvtøkuspurningur – føroyskt C-stig
- Leistur – eftirmeting og afturboðan
- Leistur – lestrarætlan fyri lærugrein
- Leistur – undirvísingarfrágreiðing

## Tímatal

Undirvísingin fevnir um 105 klokkutímar (60 minuttir) og 30 tímar (60 minuttir) í næmingatíð. Vanliga verður undirvíst fýra undirvísingartímar (45 minuttir) um vikuna í eitt ár.

# Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki ... 3
1.1. Talaða málið ... 4
1.2. Skrivaða málið ... 4
1.3. Málkunnleiki ... 5
2. Førleikar ... 5
2.1. Faklig førleikamál – C-stig ... 5
2.2. Støðisførleikar ... 8
3. Eftirmeting og próvtøka ... 8
3.1. Eftirmeting og afturboðan ... 8
3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet ... 9
3.3. Skrivlig próvtøka á C-stigi ... 9
3.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á C-stigi ... 10
3.3.2. Próvtalslýsing – skrivlig próvtøka á C-stigi ... 10
3.4. Munnlig próvtøka á C-stigi ... 11
3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á C-stigi ... 13
3.4.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka á C-stigi ... 13
4. Lestrarætlan og undirvísingarfrágreiðingar ... 14

# 1. Kjarnaøki

*Lærugreinin føroyskt hevur trý ymisk kjarnaøki, ið eru tey somu frá lægsta til hægsta stig. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*

*Føroyskt 1-A*

Kjarnin í lærugreinini føroyskum er føroyskt mál og føroyskir tekstir við støði í víðkaða teksthugtakinum, sum fevnir um øll sløg av tekstum. Teksthugtakið fevnir sostatt bæði um siðbundin fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg og um film, ljóð, myndir, heimasíður og aðrar margháttaðar tekstir.

Kjarnaøkini umskarast, soleiðis at skilja, at flestu tekstir og arbeiðshættir hava eyðkenni frá meira enn einum kjarnaøki. Tískil verður fyri tað mesta arbeitt á fleiri kjarnaøkjum samstundis, hóast denturin kann liggja á ávísum kjarnaøki.

Mælt verður til, at næmingarnir í føroyskum á C-stigi til samans lesa tað, sum svarar til umleið 200 síður av ástøði og tekstum, herímillum eisini margháttaðum tekstum. Síðutalið er leiðbeinandi, soleiðis at skilja, at tað ikki er ætlanin, at lærarar skulu telja allar síður og uppgeva síðutøl í undirvísingarfrágreiðingunum. Síðutalið er í sjálvum sær ikki avgerandi fyri, hvussu nógv tíð verður brúkt til undirvísing og arbeiði við ymsu tekstunum, og rúm skal eisini vera fyri at arbeiða við margháttaðum tekstum, sum ikki hava síðutøl.

Umframt hesar umleið 200 síðurnar verður mælt til, at næmingarnir lesa í minsta lagi eitt av niðanfyri nevndu verkum:

- eina skaldsøgu
- eitt útgivið savn við styttri tekstum (yrkingasavn, stuttsøgusavn, yrkistekstsavn ella líknandi)
- eitt leikrit
- eitt samansett savn av styttri tekstum (umleið 100 síður) í sambandi við eitt nú temalestur
- ein spæli- ella heimildarfilm ella eitt samansett savn av margháttaðum tekstum, sum í vavi og undirvísingartíð svarar til umleið 100 síður.

Næmingarnir eiga at fáa ávirkan á tekstúrvalið, og ávísa yrkisútbúgvingin eigur, um til ber, at síggjast aftur í tekstúrvalinum.

Tekstir, sum verða lisnir í lærugreinini føroyskum, eiga í størst møguligan mun at vera á føroyskum máli. Flestu tekstirnir eiga at vera upprunaføroyskir, men týddir tekstir eiga eisini at verða lisnir. Tekstir, sum føroyingar hava skrivað á øðrum málum, kunnu eisini lesast. Í sambandi við frásjónargerð kunnu tekstir á øðrum málum eisini verða lisnir. Talan kann t.d. vera um tekstir, sum eru serliga viðkomandi fyri ávíst tema, men ikki eru týddir til føroyskt.

Margháttaðir tekstir, t.d. filmar, eiga eisini í størst møguligan mun at vera á føroyskum ella norðurlendskum máli (undirtekstur á føroyskum/norðurlendskum telur ikki sum føroyskt/norðurlendskt mál). Margháttaðir tekstir á øðrum málum kunnu tó væl nýtast í sambandi við frásjónargerð. Talan kann t.d. vera um eftirlagingar (t.d. filmatisering av skaldsligum teksti) og myndir, sum eru serliga viðkomandi fyri ávíst tema.

At lesa nógv mennir bæði lesi- og skriviførleikar. Umframt vavið á tekstum, sum er nevnt omanfyri, eigur undirvísingin at eggja næmingunum til at lesa framíhjá. Hetta kann gerast t.d. í samstarvi við bókasavnið á skúlanum.

# 1.1. Talaða málið

*Kjarnaøkið talaða málið snýr seg um at tosa, at lurta, at skilja og at rannsaka talaða føroyska málið. At samskifta væl og skiljandi og at lurta eru avgerandi sosialir og mentanarligir førleikar. Støðan, samskift verður í, skapar karm um samskiftisháttin. Undirvísingin skal tí fevna um ymisk munnlig tekstsløg og margháttað tekstsløg, sum hvørt á sín hátt skulu styrkja fatanina av ymsum munnligum samskiftisháttum og av leiklutum teirra samskiftandi.*

*Føroyskt 1-A*

Talaða málið fevnir bæði um at viðgera talað mál, so sum kjak, røður og poddvarp, og um at samskifta munnliga og halda munnligar framløgur. Ymisk munnlig tekstsløg skulu viðgerast, men denturin eigur, um til ber, at liggja á yrkisviðkomandi tekstum.

Munnligu tekstirnir skulu viðgerast við viðkomandi háttalagi, og næmingarnir skulu eisini sjálvir skapa munnligar tekstir, so sum ljóðbrot, filmsbrot og munnligar framløgur.

# 1.2. Skrivaða málið

*Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um at lesa og skriva føroyskt. At lesa og skriva eru javnskipaðar læritilgongdir, har næmingurin mennir skriviførleikan við at lesa og lesiførleikan við at skriva. Hugur næminganna at lesa og skriva skal stimbrast og somuleiðis tilvitan teirra um lesi- og skrivitilgongdina. Undirvísingin skal fevna um eitt fjølbroytt úrval av ymiskum fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum.*

*Føroyskt 1-A*

Skrivaða málið fevnir bæði um at lesa tekstir og at skapa tekstir. Lisna tekstúrvalið skal fevna um eitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstum umboðandi ymisk tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg. Denturin eigur, um til ber, at liggja á yrkisviðkomandi tekstum og tekstsløgum.

Tekstirnir skulu viðgerast við viðkomandi háttalagi, og næmingarnir skulu eisini sjálvir skapa tekstir, bæði skrivligar og margháttaðar.

## 1.3. Málkunnleiki

*Kjarnaøkið málkunnleiki fevnir um føroyska málløru og málsøgu. Næmingarnir fáa innlit í málið sum skipan og tilknýti tess til mentan og samleika. Undirvísingin skal fevna um málløru á støðugt hækkandi torleikastigi, føroyska málsøgu og norðurlendska málfelagsskapin.*

*Føroyskt 1-A*

Arbeiðast skal við málløru og málløruhugtøkum, soleiðis at næmingarnir ogna sær førleikar at samskifta munnliga og skrivliga á røttum, neyvum og fjølbroyttum føroyskum máli.

# 2. Førleikar

## 2.1. Faklig førleikamál – C-stig

Fakligu førleikamálini eru orðað eftir besta próvtali, soleiðis at skilja, at um næmingurin hevur ognað sær førleikamálini væl og virðiliga, fær hann/hon próvtalið 12. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

- *at orða seg málsliga rætt, greitt, neyvt og fjølbroytt, bæði skrivliga og munnliga, eftir endamáli og samskiftisstøðu*

*Føroyskt 1-A*

Føroyskt mál og málnýtsla eru støðugt í broyting, og tí ber neyvan til at gera eina fullfíggjaða lýsing av rættari, greiðari, neyvari og fjølbroyttari málnýtslu. Endamálið og samskiftisstøðan hava eisini sína ávirkan á málnýtsluna, og umráðandi er tí altíð at hava hesi í huga, tá ið metast skal um málnýtslu.

At læra at orða seg væl og neyvt, eins og lýst omanfyri, krevur, at næmingarnir arbeiða nógv og miðvíst við málinum, bæði munnliga og skrivliga. Við at lesa nógvar fjølbroyttar tekstir økist orðfeingið, eins og næmingarnir læra orð- og setningsmyndir, sum hjálpa teimum við stavseting og orðalagi. Venjingar, bæði munnligar og skrivligar, eru eisini neyðugar fyri at kunna røkka málinum.

Skrivliga eiga næmingarnir at orða seg rætt á føroyskum sambært teimum stavsetingar- og málløvureglum, sum eru galdandi. Í talumáli eru fleiri variatiónir, so sum staðbundnir málføramunir og samanfall av ymsum bendingum. Tó eiga næmingarnir, eisini í munnligum samskifti, at leggja seg eftir at málbera seg rætt, greitt, neyvt og fjølbroytt. Atlit skal tó takast at ymsu málførunum hjá næmingunum.

- *at nýta og grunda um viðkomandi samskiftishættir og grundgevingarhættir eftir endamáli og samskiftisstøðu*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at gerast tilvitaðir um viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald í samskiftisstøðuni. Slík tilvitan styrkir førleikan at velja viðkomandi hættir at samskifta og grundgeva, bæði munnliga og skrivliga. Undirvísingin eigur eisini at fevna um samskifti á talgildum pallum, herímillum á sosialum miðlum.

- *at skyna á ymsum samskiftishættum í fyritøkum og á stovnum, herímillum innanhýsis og uttanhýsis samskiftishættum*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at arbeiða við dømum um samskifti í fyritøkum og/ella á stovnum, bæði innanhýsis og uttanhýsis samskifti. Talan kann eitt nú vera um teldupostsamskifti, fundarfrásagnir og starvsumsóknir.

- *at velja og nýta viðkomandi framløguhættir, herímillum munnligar og margháttaðar, eftir evni og endamáli*

*Føroyskt 1-A*

At leggja fram er grundleggjandi førleiki í lærugreinini føroyskum, sum skal styrkjast og venjast. Næmingarnir eiga at skipa framløgur av ymsum slag. Talan kann eitt nú vera um at halda munnligar framløgur fyri flokkinum og at skapa ymsar margháttaðar framløgutekstir.

- *at velja og nýta ymsar viðkomandi lesisnildir eftir lesiendamáli, tekstslagi og høpi*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at gerast tilvitaðir um ymiskar lesisnildir, soleiðis at tey gerast før fyri at lesa eftir lesiendamáli. Dømi um lesisnildir eru: yvirlitslesing, snarlesing, nærlesing og punktlesing. Tað er í hesum sambandi umráðandi, at lesiendamálið verður lýst, og at undirvísingin eisini verður skipað soleiðis, at lesiendamálið er ymiskt. Dømi um lesiendamál kunnu vera: fáa vitan, greina og tulka, svara fakligum spurningum, skriva um tekstin, uppliva lesigleði, víðka um orðfeingið, menna málsligar førleikar o.s.fr.

- *at greina, tulka og seta í frásjón ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at fáa kunnleika um ymisk amboð at greina og tulka fagur- og yrkisbókmentaligar tekstir. Fagurbókmentalig greiningaramboð fevna eitt nú um frásagnarviðurskifti, bygging, persónslýsingar, umhvørvislýsingar og huglag. Yrkisbókmentalig greiningaramboð fevna eitt nú um grundgevingar, málnýtslu og viðurskiftini millum sendara, móttakara, miðil og innihald. Viðvíkjandi margháttaðum tekstum skulu visuellu og ljóðligu viðurskiftini eisini viðgerast, og arbeiðast kann eitt nú við myndagreining og filmsgreining. Umframt greining og tulking skulu tekstirnir eisini setast í frásjón, tað kann t.d. vera í samfelagsligt høpi ella í tíðarhøpi.

- *at velja og nýta viðkomandi skrivisnildir at skriva og skapa ymisk viðkomandi tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg*

*Føroyskt 1-A*

Næmingarnir eiga at skriva regluliga, bæði í sjálvari undirvísingini og heima. Lesing og skriving hanga saman, soleiðis at skilja, at næmingarnir við at skriva ymisk tekstsløg eisini læra betur at lesa og skilja tekstsløgini. Skilagott er tí at lata næmingarnar royna seg við at skriva smáar tekstir ella tekstbrot í teimum tekstsløgunum, sum arbeitt verður við.

Við ymsum skapandi skrivihættum kunnu næmingarnir eisini menna fakligar førleikar á ymsar hættir. Tey kunnu t.d. læra nógv um eyðkenni við tekstsløgum við eftirlaging (remediering), har tekstur

verður umskrivaður til annað tekstslag. Eitt nú kunnu næmingarnir við lutaleiki, har tey t.d. fáa útlutað ávís sjónarmið, menna førleikarnar at grundgeva og greiða frá sjónarmiðum.

Við menningini av vitlíki (AI) og øðrum hjálparamboðum gerst arbeiðsgongdin í sambandi við skriving enn meira týdningarmikil. Í undirvísingini eigur tí størri dentur at verða lagdur á arbeiðsgongdina enn á endaliga avrikið. Arbeiðast kann eitt nú við ávegisskriving, har næmingarnir skriva í undirvísingini við læraranum sum leiðbeinara. Vitlíki kann vera eitt hent hjálparamboð og eigur at verða tikið við í undirvísingina. Næmingarnir kunnu eitt nú brúka vitlíki til at leita eftir upplýsingum og viðgera hesar kritiskt. Eisini kunnu tey kritiskt viðgera tekstir, sum eru gjørdir við vitlíki og t.d. samanbera við aðrar líknandi tekstir.

Vanliga skal skrivligt arbeiði, sum verður gjørt í undirvísingini, ikki telja sum næmingatíð. Næmingatíðin skal brúkast til skrivligt heimaarbeiði, sum lærarin so skal eftirmeta. Tað ber tó væl til at sameina skrivligt arbeiði í undirvísingini, har lærarin er leiðbeinari, og skrivligt heimaarbeiði, har lærarin eftirmetir. Tá eigur lærarin í hvørjum einstøkum førum at meta um, hvussu stórur partur av arbeiðinum skal telja sum næmingatíð.

Næmingarnir hava 30 tímar í næmingatíð í føroyskum á C-stigi. Lærarin skal í hvørjum einstøkum føri meta um, hvussu nógv næmingatíð skal setast av til hvørja uppgávu. Hetta kann skifta t.d. eftir uppgávuslagi og eftir, hvussu nógva undirvísing næmingarnir hava fingið í ávísu uppgávuni. Skilagott er at brúka ein part av næmingatíðini til próvtøkulíknandi uppgávur. Arbeiðið við próvtøkulíknandi uppgávum kann skipast á ymsar hættir, t.d. við ávegisskriving og at lata somu betraðu uppgávu inn eina ferð afturat. Næmingatíð eigur eisini at verða brúkt til aðrar skrivivenjingar, t.d. mállæruuppgávur, smáar fakligar uppgávur, verkætlanir, ávegistekstir og margháttaðar tekstir, so sum framløgutekstir, ljóð- og filmsbrot.

- *kritiskt at velja, vísa til og endurgeva keldur á rættan hátt*

*Føroyskt 1-A*

Í sambandi við fakligt arbeiði skulu næmingarnir regluliga arbeiða við keldum og keldukritikki, herímillum eisini við upphavsrætti og samtykki. Næmingarnir skulu læra at leita eftir keldum, bæði á netinum og á bókasøvnum, at meta um hesar og vísa til tær á rættan hátt.

- *kritiskt og við umhugsni at velja og nýta viðkomandi tíðarbærar miðlar*

*Føroyskt 1-A*

Miðlalandslagið er støðugt í broyting, og nýggir miðlar koma javnan undan kavi. Næmingarnir eiga at verða tilvitaðir um miðlanýtslu og kritiskt taka støðu til innihaldið í ymsum miðlum, herímillum eisini sosialum miðlum. Arbeiðast kann t.d. við samskiftisháttum og samskiftisgreining.

- *at nýta mállæruhugtøk og reglur fyri skriftmálið, herímillum fyri stavseting, tekseting, bendingarlæru og orðalagslæru*

*Føroyskt 1-A*

Mállæruundirvísingin hevur til endamáls, at næmingarnir duga mállærureglurnar so mikið væl, at tey við at brúka tær megna at skriva rætt, greitt og neyvt. Næmingarnir eiga, umframt tey føroysku, eisini at læra latínsku mállæruheitini.

## 2.2. Støðisførleikar

- *Lesing*
- *Skriving*
- *Munnligt samskifti*

*Støðisnámsætlan*

Lesing, skriving og munnligt samskifti eru grundleggjandi førleikar í føroyskum, sum eru væl lýstir í pørtunum um kjarnaøki og faklig førleikamál.

- *Kt-førleikar og talgildisbúgving*

*Støðisnámsætlan*

Av viðkomandi kt-amboðum í lærugreinini føroyskum kunnu nevnast forrit til at skapa og viðgera tekstir, herímillum eisini margháttaðar tekstir, framløguforrit, samskiftis- og samstarvsforrit, rættstavari, talgildar orðabøkur, leitiskipanir o.s.fr. Næmingarnir eiga eisini at fáa innlit í kt-amboð við vitlíki (AI) og møguleikar og avmarkingar við vitlíki. Kt-amboð við vitlíki kunnu nýtast skilagott og viðkomandi til eitt nú at finna upplýsingar og til at fáa íblástur og hugskot.

Umráðandi er, at næmingarnir fata kt-amboðini sum nýtsluamboð og lata føroyskfakliga evnið, sum arbeitt verður við, verða ráðandi, tá ið ávísa kt-amboðið skal veljast. Við regluliga at nýta kt-amboð til at loysa ymsar uppgávur læra næmingarnir av egnum royndum fyrimunir og vansar við at nýta ymisk kt-amboð í lærugreinini føroyskum.

# 3. Eftirmeting og próvtøka

## 3.1. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Í hesum sambandi er tað týdningarmikið, at skúlaverkið strembar eftir at skapa eitt trygt og mennandi undirvísingarumhvørvi, har undirvísingin er fjøltáttað og væl skipað við dygdargóðum fakligum innihaldi og háttaløgum. Harumframt er tað týdningarmikið, at undirvísingin hevur ítøkilig mál, so næmingarnir vita, hvat uppgávurnar fevna um, og hvat væntað verður av teimum.*

*Eftirmeting av úrtøkuni gevur bara meining, um hon verður fylgd upp av ítøkiligari afturboðan, sum tekur saman um núverandi støðu, heildarúrtøku og menning næminganna. Lærararnir skulu tí hava innlit í úrtøku, arbeiðslag og ídni hjá næmingunum í læritilgongdini.*

*Afturboðanin til næmingarnar skal leggja dent á næsta stig í tilgongdini og undirvísingina frameftir. Fyri næmingarnar snýr tað seg um, hvussu tey kunnu menna úrtøku og hegni, umframt hvussu tey kunnu tillaga ella møguliga bøta um arbeiðslag og avrik. Fyri lærararnar snýr afturboðan seg um at tillaga undirvísingina við støði í vitan um næmingaúrtøku, undirvísingargongdir, háttaløg o.a.*

*Eftirmetingin skal saman við afturboðan leggja áherðslu á læri- og menningartilgongdina heldur enn á sjálvt úrslitið. Endamálið er at eggja og stuðla næmingunum í áhaldandi at vilja læra og menna fakligu, persónligu og sosialu fortreytirnar.*

*Støðisnámsætlan*

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið ”Leistur – eftirmeting og afturboðan”, sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er eisini, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.

Víst verður til skjalið “Leistur – undirvísingarfrágreiðing”.

# 3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet

Næmingarnir skulu gjøgnum skúlaárið hava støðumet og ársmet eftir galdandi próvtalsstiga. Vanliga fáa næmingarnir støðumet fyri jólafrítíðina og fyri páskafrítíðina og so ársmet við skúlaárslok. Í sambandi við royndir skulu næmingarnir eisini hava royndarmet.

Metini verða givin við støði í fakligu førleikamálunum og støðisførleikunum. Støðu- og ársmetini eru sostatt meting lærarans av, í hvønn mun næmingarnir í framdum avrikum lúka sett førleikamál, samanborið við framda undirvísing. Royndarmetini verða givin við støði í ávísum uppgávuorðingum.

Støðu- og ársmetini skulu lýsa fakliga støðið í løtuni, tá ið metini verða givin. Talan eigur sostatt ikki at vera um eina meting yvir eitt longri tíðarskeið ella eitt miðal av fleiri avrikum.

Atburður, uppmøting og arbeiðssemi eiga í sjálvum sær ikki at vera tikin við í støðu- og ársmetini.

Ársmetini eru endalig og verða sett í prógv næminganna.

# 3.3. Skrivlig próvtøka á C-stigi

*Skrivliga próvtøkan í føroyskum er ein próvtøka í skrivligari framseting og tekstførleika.*

*Skrivliga próvtøkan varir fýra tímar. Allir hjálparmiðlar eru loyvdir. Próvtakarin skal við støði í einum ella fleiri tekstum sjálvstøðugt skriva ein tekst.*

*Próvtøkutilfarið fevnir um avmarkaða nøgd av tekstum í hóskandi vavi við 4-5 uppgávum, harav próvtakarin svarar einari uppgávu. Tekstúrvalið fevnir um ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg.*

*Føroyskt 1-A*

At allir hjálparmiðlar eru loyvdir skal skiljast soleiðis, at próvtakarin kann nýta alt undirvísingartilfar og orðabøkur sum hjálparmiðlar. Eisini kann próvtakarin brúka rættstavara á telduni sum hjálparmiðil. Próvtakarin kann ikki reika frítt á netinum, men hann/hon eigur at hava atgongd til

orðabøkur og netborið undirvísingartilfar. Avrikið, sum próvtakarin letur inn, skal vera egið avrik, og tí hevur próvtakarin ikki loyvi at nýta vitlíki (AI) ella at samskifta við onnur enn umsjónarfólk, meðan próvtøkan er.

Uppgávurnar fevna um at skriva ein tekst við støði í eini viðgerð av einum ella fleiri tekstum og frásjónargerð.

Longdin á avrikinum er ikki ásett í uppgávuni, men mælt verður til at lata tekstin fevna um 2-3 síður á 2.400 sløg.

Víst verður til skjalið "Leiðbeining – skrivlig próvtøka – føroyskt C-stig".

### 3.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka á C-stigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður sum heild lagdur á, hvussu próvtakarin megnar at viðgera próvtøkutilfarið, skipa tekstin, nýta føroyskfakliga vitan og faklig háttaløg í lærugreinini. Eisini verður dentur lagdur á, hvussu rætt og greitt próvtakarin megnar at orða seg á føroyskum máli.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av avriki próvtakarans. Fyri at standa próvtøkuna krevst tó, at avrikið er nøktandi væl og rætt orðað á føroyskum máli.*

*Føroyskt 1-A*

Dømingin er ein heildarmeting, men fyri at standa próvtøkuna skal próvtakarin orða seg nøktandi rætt á føroyskum sambært teimum stavsetingar- og mállærureglum, sum eru galdandi. Hetta merkir, at próvtakarin nóg væl skal duga stavseting, bending, teknseting og orðalag í føroyskum. Fleiri grovar villur kunnu vera, men tað er ikki nøktandi at hava grovar villur í nærum hvørjum setningi.

Víst verður til skjalið "Metingarark – skrivlig próvtøka – føroyskt C-stig".

### 3.3.2. Próvtalslýsing – skrivlig próvtøka á C-stigi

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Málburðurin er sera góður, fjølbroyttur og neyvur við ongum ella bert fáum týdningarleysum villum. Próvtakarin dugir sera væl at próvføra og skipa og byggir avrikið skilvíst upp. Próvtakarin viðger tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er sera væl grundað við ongum ella bert fáum týdningarleysum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur sera gott tak á háttalagi og dugir sera væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **10** | Sera gott | Málburðurin er góður, fjølbroyttur og neyvur, tó við nøkrum villum. Próvtakarin dugir væl at próvføra og skipa og byggir avrikið skilvíst upp. Próvtakarin viðger tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er væl grundað, tó við nøkrum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á |

| | | |
|---|---|---|
| | | háttalagi og dugir væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **7** | Gott | Málburðurin er sum heild góður, fjølbroyttur og neyvur, tó við fleiri villum. Próvførslan er heldur grunn, men próvtakarin byggir avrikið rímiliga skilvíst upp. Próvtakarin viðger tilfarið rímiliga væl, og viðgerðin er rímiliga væl grundað, tó við fleiri manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur rímiliga gott tak á háttalagi og dugir rímiliga væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **4** | Hampiligt | Málburðurin er rímiliga góður og neyvur, tó við fleiri grovum villum. Próvførslan er sum heild grunn, og avrikið er sum heild ikki bygt væl upp. Próvtakarin viðger tilfarið nakað trilvandi, men viðgerðin er tó hampiliga væl grundað, tó við fleiri stórum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi og dugir sum heild at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at tó illa at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **02** | Nøktandi | Málburðurin er í lagi, men ikki serliga neyvur og við fleiri grovum villum. Próvførslan er grunn, og avrikið er ikki væl bygt upp. Próvtakarin viðger tilfarið sera trilvandi, men tó nøktandi. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi, men megnar sum heild illa at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild ikki at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **00** | Ikki nøktandi | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |
| **-3** | Heilt vánaligt | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

# 3.4. Munnlig próvtøka á C-stigi

*Munnliga próvtøkan í føroyskum er ein próvtøka í munnligari framseting og tekstførleika.*

*Próvhoyringin varir umleið 20 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er umleið 40 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.*

*Undir próvhoyringini leggur próvtakarin fyri við framløgu við støði í próvtøkuspurninginum, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Restin av próvhoyringin er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara við støði í próvtøkuspurninginum og framløgu próvtakarans.*

*Próvtakarin verður próvhoyrdur í ólisnum tilfari, sum kann fevna um styttri tekstir, brot úr størri verkum ella annað tilfar í hóskandi vavi. Ólisna tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, økjum o.t., sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini.*

*Í síni heild skal ólisna tilfarið umboða eitt breitt úrval av fagur- og yrkisbókmentaligum tekstsløgum, herímillum eisini margháttaðum tekstsløgum. Ólisna tilfarið, sum í mesta lagi skal vera fimm normalsíður ella samsvarandi, skal viðgerast við viðkomandi háttalagi og sjálvstøðugt setast í frásjón og í samband við lisið tilfar.*

*Sami próvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.*

*Føroyskt 1-A*

Próvhoyrarin ger próvtøkuspurningarnar, sum skulu sendast próvdómara til góðkenningar í seinasta lagi fimm gerandisdagar fyri próvtøkuna. Samlaða talið á próvtøkuspurningum skal í minsta lagi vera talið á próvtakarum + trý. Sami próvtøkuspurningur kann verða nýttur tvær ferðir.

Í próvtøkuspurninginum skal greitt koma fram, at próvtakarin við viðkomandi háttalagi skal viðgera ólisna tilfarið og seta í frásjón og í samband við lisið tilfar úr undirvísingarfrágreiðingunum. Leiðbeinandi spurningar, sum t.d. biðja próvtakaran leggja dent á nakað ávíst í viðgerðini ella í frásjónargerðini, kunnu vera. Somuleiðis ber til at vísa á ávíst lisið tilfar at seta í samband við. Havast má tá í huga, at leiðbeinandi spurningar ávirka torleikastigið á próvtøkuspurninginum og harvið eisini heildarmetingina av avrikinum hjá próvtakaranum.

Ólisna tilfarið skal umboða ymisk fagur- og yrkisbókmentalig tekstsløg, herímillum eisini margháttað tekstsløg. Viðkomandi upplýsingar, so sum høvundur, møguligur týðari, heiti og útgávuár skulu fylgja við ólisnu tekstunum.

Víst verður til skjalið: "Leiðbeining – munnligur próvtøkuspurningur – føroyskt C-stig".

Mannagongd til munnliga próvtøku:

- Próvtakarin fær próvtøkuspurning og ólisið tilfar, og próvhoyrarin fylgir honum/henni í fyrireikingarhølið.
- Próvtakarin fyrireikar seg í umleið 40 minuttir. Í fyrireikingarhølinum kann próvtakarin nýta alt undirvísingartilfar og orðabøkur sum hjálparmiðlar. Próvtakarin kann ikki reika frítt á netinum, men hann/hon kann brúka netbornar orðabøkur og netborið undirvísingartilfar. Próvtakarin hevur ikki loyvi at nýta vitlíki (AI) ella at samskifta við onnur í fyrireikingartíðini.
- Próvhoyrarin heintar próvtakaran í fyrireikingarhølinum. Við sær inn í próvtøkuhølið kann próvtakarin hava próvtøkuspurningin, ólisna tilfarið og tað, sum hann/hon hevur skrivað í fyrireikingartíðini. Er tilfarið talgilt, kann próvtakarin hava teldu við í próvtøkuhølið, men hann/hon kann ikki taka annað tilfar fram enn tað, sum er nevnt omanfyri.
- Próvtakarin leggur fram við støði í próvtøkuspurninginum og -tilfarinum í umleið tíggju minuttir.
- Próvtakari, próvhoyrari og møguliga próvdómari samrøða fakliga í 5-10 minuttir við støði í framløguni, próvtøkuspurninginum og ólisna tilfarinum.
- Próvhoyrari og próvdómari áseta próvtalið, og próvhoyrarin sigur próvtakaranum próvtalið, meðan próvdómarin hoyrir.

Mælt verður til, at framløgan hjá próvtakaranum fevnir um umleið tíggju minuttir, tíðin kann skifta nakað, alt eftir próvtøkuspurningi og evnum próvtakarans. Longdin á framløguni og fakligu samrøðuni er ikki avgerandi í sjálvum sær. Tað, sum er mest avgerandi, er, at próvtakarin sjálvstøðugt leggur tilfarið fram og fær høvi til at koma í dýpdina við tilfarinum.

### 3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka á C-stigi

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Próvtakarin skal við støði í einari fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt og við neyvum og fjølbroyttum máli at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum próvtøkuspurningi. Hann/hon skal sýna, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við tættir í undirvísingini og seta próvtøkutilfarið í frásjón. Próvtakarin skal duga at nýta føroyskfakliga vitan og faklig háttaløg í lærugreinini. Eisini verður dentur lagdur á, at próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.*

*Føroyskt 1-A*

Dømingin er ein heildarmeting við støði í framløguni og í fakligu samrøðuni. Dentur skal leggjast á fakliga innihaldið, skipan av framløgu og á, hvussu væl próvtakarin orðar seg á føroyskum máli.

### 3.4.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka á C-stigi

| **Próvtal** | **Heiti** | **Lýsing** |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Munnliga framløgan er sera greið og væl skipað. Málið í framløguni er fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sera virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger og troytir tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er sera væl grundað við ongum ella bert fáum týdningarleysum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir sera væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **10** | Sera gott | Munnliga framløgan er greið og væl skipað. Málið í framløguni er sum heild fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger og troytir tilfarið á góðan hátt, og viðgerðin er væl grundað, tó við nøkrum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur gott tak á háttalagi og dugir væl at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild væl at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **7** | Gott | Munnliga framløgan er sum heild góð og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er rímiliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið heldur trilvandi, men viðgerðin er tó |

| | | |
|---|---|---|
| | | rímiliga væl grundað, tó við fleiri manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi og dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **4** | Hampiligt | Munnliga framløgan er í lagi og rímiliga væl skipað. Málið í framløguni er í lagi, men ikki serliga fjølbroytt og neyvt. Próvtakarin er sum heild virkin í fakligu samrøðuni. Hann/hon viðger tilfarið trilvandi, men viðgerðin er tó rímiliga væl grundað, tó við fleiri stórum manglum. Próvtakarin vísir, at hann/hon sum heild hevur tak á háttalagi og dugir at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar tó illa at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **02** | Nøktandi | Munnliga framløgan er trilvandi og hongur ikki væl saman. Framløgan er skillig, men málsliga veik. Próvtakarin er ikki serliga virkin í fakligu samrøðuni. Viðgerðin er grunn og heldur illa skipað, tó er hon á einari leið. Próvtakarin vísir, at hann/hon hevur tak á háttalagi, men megnar sum heild illa at nýta vitan og hugtøk úr lærugreinini. Hann/hon megnar sum heild ikki at flyta seg frá tí ítøkiliga til tað úrtøkiliga. |
| **00** | Ikki nøktandi | Verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur fakligu málini í lærugreinini. |
| **-3** | Heilt vánaligt | Verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

# 4. Lestrarætlan og undirvísingarfrágreiðingar

Lestrarætlanin er eitt yvirskipað skjal við yvirliti yvir ráðlagdar undirvísingargongdir fyri skúlaárið.

Lærarin skal so hvørt í undirvísingini gera undirvísingarfrágreiðingar, sum eru ítøkiligar lýsingar av hildnum undirvísingargongdum. Nakað fyri skúlaárslok skulu undirvísingarfrágreiðingarnar fyri farna skúlaár gerast lidnar. Endamálið við undirvísingarfrágreiðingunum er at skjalfesta, at undirvísingin hevur lokið krøvini í galdandi námsætlanum. Undirvísingarfrágreiðingarnar eru eisini støði undir munnligu próvtøkuni og verða latnar próvdómara.

Víst verður til skjølini: "Leistur – lestrarætlan fyri lærugrein" og "Leistur – undirvísingarfrágreiðing".